# Mín besta **uppskrift**

**LAGT TIL RÆTTIS:** Inna Törnroos



**UPPSKRIFT:** Maria Jacobsen

## Purruterta

**Botnur:**
300 gr av mjøli
200 gr av margarini
ca 1 1/4 dl av vatni
*Hetta skal eltast saman og setast í køliskápið í ein tíma.*

**Sós:**
25 gr av margarini
2 spsk av mjøli
3 dl buljong
1 egg

**Fylla:**
100-200 gr av skinkubitum
2 purrur
2-4 gularøtur
1 leyk

Smelta margarinið í eini grýtu, koyr mjølið í, stoyt so buljong í so við og við, meðan tú rørir og koyr umleið helvtina av egginum í. Restin skal brúkast at pensla við.

Blanda skinkubitarnir í sósina.

Sker purrur, gularøtir og leyk smátt og svitsa tað á pannuni. Rulla deiggið út og koyr tað í ein rundan tertuform. Lat eitt sindur verða eftur til at leggja omaná tertuna. Stoyt sósina við skinku omanyvir, síðan purrur, gularøtur og leyk.

Flætta restina av deigginum omanyvir og pensla við egginum.

Baka niðast í ovninum í 45 minuttir á 200 hitastigum.

Bjóða eina fríska skál av salati afturvið.

### MÍN BESTA UPPSKRIFT

er nýggjur teigur í Vikuskiftis Sosialinum, har lesarin kann senda okkum sína bestu uppskrift, saman við mynd av rættinum og navni á kokkinum.

Øll sløg av uppskriftum eru vælkomnar, bæði bakstur, matur og drekka, men tær skulu ikki hava verið almannakunngjørdar áður.

Send tína bestu uppskrift til:
**Sosialurin**
**Postboks 76**
**FO-110 Tórshavn**
**mrk. uppskrift**

Ella til post@sosialurin.fo.

Uppskriftin, sum verður prentað í blaðnum, fær *gávukort á kr. 300,-* frá **Thomas Dam búnýti**



Thomas Dam búnýti
TÓRSHAVN
Niels Finsensgøta 18
tel. 36 30 00
SALTANGARÁ
Heiðavegur 56
tel. 44 76 04

# Kappingarførir tónleikarar

NÆSTU VIKURNAR SKULU FLEIRI FØROYSKIR **TÓNLEIKARAR** TAKA LUT Í STÓRUM KAPPINGUM Í OKKARA GRANNALONDUM



*Anna Nygaard skal royna seg í X-Factor, ið m.a. føroyska Linda Andrews vann á sinni.*

**MYNDIR:** JENS KRISTIAN VANG

**TÓNLEIKUR**

**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo

Vit minnast stóru føroysku sigrarnar í útlendskum sjónvarpskappingum. Guðrun Sólja Jacobsen var stjørna í meira enn eitt kvøld. Jógvan Hansen hevði størri x-factor enn íslendingar. Gunnar Mikkelsen fekk sína løtu á tindinum. Og so var tað Linda Andrews, sum var stóra stjørnan í donsku X Factor kappingini í fjør.

Føroyingar hava ferð eftir ferð gjørt vart við seg í tónleikakappingum, sum fylla nógv í okkara grannalondum, tí tær verða sjónvarpaðar til eina stóra fjøld. Fleiri hava vunnið, onnur hava staðið seg væl, og nú eru aftur fleiri, sum bjóða seg fram.

Næstu vikurnar kunnu føroyingar fylgja trimum føroyskum sangarum í størst tónleikakappingunum í Danmark og Føroyum, og vandin fyri kulturimperialismu – sum onkur kallar hesar kappingarnar – er øktur.

### Anna, Jógvan og Jens Marni

Fríggjakvøldið sleppa føroyingar – og danir – at síggja Onnu Nygaard í X-Factor fyri fyrstu ferð. Evnaríka songkvinnan verður fríggjakvøldið til upptøkuroynd, og longu nú er greitt, at fyrsta royndin hjá henni eydnast væl

Leygarkvøldið verður Jógvan Hansen við í íslendska Grand Prixnum, har hann skal syngja sang, sum Bubbi Morthens hevur verið við til at skriva. Hetta er triðju ferð, at Jógvan Hansen er við í Eurovision, sum íslendingar kalla kappingina, og spurningurin er, um tíðin nú er komin til, at fyrsti føroyingurin vinnur eina slíka kapping. Nógv talar í øllum førum fyri, at Jógvan Hansen kann koma langt í kappingini.

Og nú um dagarnar kom eisini fram, at Jens Marni Hansen skal verða við í danska Grand Prixnum, sum verður hildið fyrst í februar.

Spurningurin er so, um føroyingar fáa enn ein sigur í útlendskari sjónvarpskapping.